## Spill av tíð hjá Tem og Andrew

Fremad Amager, sum nú hevur fingið føroyskar eigarar, spældi leygardagin venjingardyst í Greve, men sambært venjaranum hjá Fremad Amager var talan um spill av tíð. Vindurin var so nógvur, at tað var ikki spælandi. Eitt mál kom í dystinum, og tað fekk Greve eftir 77 minuttir. Andrew av Fløtum og Tem Hansen spældu báðir við frá byrjan, men teir vóru skiftir út eftir ein tíma.



## Romario nærkast 1000 málum

Brasilski álopsspælarin Romario er nær við at gera sítt mál nummar 1000 í sínum fótbóltslívi. 41 ára gamli Romario spælir nú fyri felagið Vasco Da Gama, og við einum hattricki kom Romario sambært egnum útrokningum upp á mál nummar 998 í hesum dysti. Romarion hevur lovað, at hann skal skorað 1000 mál, áðrenn hann gevst við síni drúgvu yrkisleið sum fótbóltsspælari.

Mjølnir-KÍF 3-2 (25-23, 17-25, 25-17, 19-25, 15-10)

## Mjølnir vann síðsta dystin

Mjølnir hevði ongan møguleika at koma av aftasta plássinum undan seinasta dystinum í meistaradeildini hjá kvinnum, har tær tóku ímóti KÍF. KÍF hevði heldur ikki nógv at spæla fyri, tí tær lógu á fjórða plássi og høvdu ongan møguleika at koma upp á triðja plássi. Mjølnir vísti seg tó at vera betri henda dagin. Tær vunnu fyrsta sett 25-23, men so svaraði KÍF aftur og vann annað sett 25-17. Mjølnir tók tó eisini triðja sett 25-17, og so var lagt upp til ein sigur til heimaliðið. KÍF svaraði tó aftur og vann fjóðra sett 25-19, og so skuldi javnbrótari til. Her dró Mjølnir longra stráðið og vann 15-10, og sostatt fingu tær ein góðan sigur undan upp- og niðurflytingardystunum ímóti Fleyr, sum vera í komandi viku.

Mjølnir-Fram 3-0 (25-19, 27-25, 26-24)

## Mjølnir vann silvur

Eftir kvinnudystin tóku menninir hjá Mjølni ímóti Fram. Her staðfesti Mjølnir, at silvurið hoyrir heima í Klaksvík. Teir vunnu 3-0, men munurin var ikki stórur á liðnum. Í fyrsta setti vann Mjølnir gott nokk 25-19, men í hinum báðum settunum var eingin munur. Her vann Mjølnir 27-25 og 26-24, so Fram var væl við at kalla allan vegin. Mjølnir hevur sostatt vunnið silvur, meðan Fram tók sær av bronsuni í bestu mansdeildini.

H71-Neistin 28-39 (15-23)

# Neistin endaði við sigri

**Neistin vann ein tryggan men týdningarleysan sigur í seinasta umfari av Atlantic Airways kappingini, tá teir vitjaðu hjá hoyvíkingum**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

H71 og Neistin høvdu so at siga einki at spæla um, tá liðini brustu saman í seinasta umfari av Atlantic Airways kappingini á hesum sinni. Undan dystinum lá H71 niðast, meðan Neistin lá næstniðast, og tí var einki uppá spæl hjá nøkrum av liðunum undan dystinum.

**Neistin avgjørdi undan steðginum**

Dysturin var bara sjey minuttir gamal, tá hevði Neistin lagt seg á odda 5-1, og hetta sá also ikki gott út hjá ungu hoyvíkingunum. Næstu løtuna royndu teir av øllum alvi at kempa seg innaftur í dystin, og hetta gekk partvís. Teir fingu minka um munin niður í tvey mál, men nærri komu teir ikki. Eftir hetta tók Neistin fullkomiliga yvir. Restina av hálvleikinum vóru teir væl betri enn H71, og munurin gjørdist bara størri og størri.

Tá liðini fóru til hálvleiks førdi Neistin 23-15, og longú nú var dysturin avgjørdur.

**Tryggur neistasigur**

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki fekk H71 fýra mál á rað, so nú var munurin bert fýra mál. Neistin vildi tó ikki loyva H71 innaftur í dystin. Næstu løtuna drógu teir frá aftur, og tá ið góðir 20 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, vóru 10 mál á muni aftur, so nú var liðugt.

At enda vann Neistin ein sannførandi 11 mála sigur, og í seinasta dystinum var slett eingin ivi. Neistin var nógv betra liðið, og sigurin var fult uppiborin.



*Neistamenn vunnu tryggan sigur á hoyvíkingum í seinasta dystinum hjá liðunum báðum hetta kappingarárið*

### FAKTA

**H71-Neistin 28-39 (15-23)**
**Málskjúttar:**
**H71:** Poul Kjartan Dam 9, Niels Viggo Niclassen 7 (1), Janus Sørensen 4, Gunnar Bláberg 3, Bjarni Sørensen 2, Dánjal Tórgarð 2, Heini Bendtsen 1
**Neistin:** Blagoje Buha 8 (1), Áki Mørk 5, Jugoslav Djumic 5, Tróndur Kragesten 4, Dann Thorleifsson 4, Carl Herup Olsen 3, Johann Brekkstein 2, Birgir Poulsen 2, Jens Mohr 2, Bogi Berg 2, Karl Oddmar Rasmussen 2
**Brotskøst:** H71 3, Neistin 2
**Útvísingar:** H71 2, Neistin 2
**Dómarar:** Ragnar Simonsen & Rúni Mohr

Dráttur-TB 3-0 (25-20, 25-16, 26-24)

# Dráttur vann eisini síðsta dystin

**Dráttur vann eisini seinasta dystin í meistaradeildini hjá kvinnum, og við sigrinum staðfestu tær, at tær hava uppiborið bronsuna**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Hvørki Dráttur ella TB høvdu nakað serligt at spæla um, tá liðini møttust á Giljanesi leygardagin í seinasta umfarinum av landskappingini. Dráttur hevði longu tryggjað sær bronsuheiðursmerkini undan seinasta leikumfari, meðan TB hevði ein lítlan møguleika at fáa KÍF aftur á fjórða plássi. Til hetta kravdist tó, at tær vunnu sín dyst ímóti Drátti, meðan KÍF tapti fyri Mjølni.

**Einki ivamál**

Dráttur lat tó ongan iva vera um, at bronsuheiðursmerkini vóru fult uppiborin. Tær settu seg nevniliga á dystin alt fyri eitt, og tær vunnu sær eisini eina lítla leiðslu tíðliga í fyrsta setti. So við og við øktu tær nakað um leiðsluni, og móti endanum var greitt, at Dráttur helst fór at vinna hetta settið. Tað gjørdu tær eisini, og úrslitið av hesum var 25-20 til Drátt.

Í øðrum setti var munurin enn størri á liðunum. Nú var Dráttur nógv betri, og tær løgdu seg eisini á odda mest sum alt fyri eitt. Sum settið leið, øktu tær bara um munin, og at enda vunnu tær ein sannførandi 25-16 sigur, og her var alt, sum bendi á, at Dráttur fór at vinna ein sannførandi sigur.

**TB var betri við**

Í triðja setti høvdu gestirnar av Tvøroyri tó sæð, hvønn veg tað var. Nú settu tær alt inn fyri at halda sær inni í dystinu, og hetta settið bleiv eisini tað mest spennandi í dystinum. Nú fylgdust liðini at kalla allan vegin, og munurin var so at siga eingin.

Til tíðir var Dráttur oman á, og til tíðir førdi TB, men til síðst var tað tó Dráttur, sum roydnist betri. TB fylgdi við allan vegin til 24-24, men hereftir vann Dráttur síðstu tveir bóltarnar, og sostatt tóku tær sær eisini av triðja setti, sum tær vunnu 26-24.

Við sigrinum staðfesti Dráttur, at bronsuheiðursmerkini hoyra heima á Giljanesi, og tær endaðu heili sjey stig frammanfyri KÍF á fjórða plássi.